betri trygging

Mai 2024

# Innbústrygging

*Skjal við upplýsingum um innbústryggingina*

Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um innbústryggingina. Tá ið skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú finnur nýggjastu tryggingartreytirnar á heimasíðu okkara www.betri.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600 og fáa nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

Innbústryggingin fevnir um skaða á innbúgv, klæðir, møblar, lutir, list og aðrar leysar lutir í heiminum. Tryggingin dekkar eisini, um tú av óvart gert skaða á onnur ella á lutir hjá øðrum.

## Hvat dekkar tryggingin?

Tú ásetur sjálv/ur ta upphædd, sum innbúgvið verður tryggjað fyri. Upphæddin er nevnd í tryggingarskjalinum. Tað er umráðandi at áseta røttu tryggingarupphæddina, so tú fært rætt endurgjald, um skaði hendir. Kanna javnan, um upphæddin er hóskandi.

Fyri ávísar lutir, t.d. reiðan pening, gull- og silvurlutir, eins og vørur í køli- og frystiskápum, er ein ”mesta upphædd” ásett. Hesa kanst tú hækka. Les meira um hetta í tryggingartreytunum.

**Dekningar**

Í tryggingini eru hesir dekningar:

- ✓ Eldur
- ✓ Útstreyming og seyring av vatni o.ø.
- ✓ Vatnskaði á lutir hjá leigarum
- ✓ Stormur
- ✓ Omanlop og áarlop
- ✓ Gloprarregn og toybil
- ✓ Ferðsluóhapp
- ✓ Innbrotstjóvarí, tjóvarí og herverk
- ✓ Rán og álop
- ✓ Súkklustuldur
- ✓ Glas- og kummutrygging
- ✓ Privat ábyrgdartrygging
- ✓ Rættarhjálp

## Tú kanst eisini velja:

- ✓ Brádligan skaða
- ✓ El-skaða
- ✓ Tøknitrygging
- ✓ Útleigutrygging til býli

**Ferðast:**

- ✓ Ársferðatrygging
- ✓ Avlýsingartrygging

Les meiri á Mín Trygging, ið tú finnur á heimasíðu okkara ella sum app.

## Hvat dekkar hon ikki?

Her eru nøkur dømi um lutir, sum innbústryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit sært tú í tryggingartreytunum.

- x Motordrivin akfør, so sum knallertir
- x Hvítvørur, um tú býrt í egnum húsum
- x Vinnuligar lutir
- x Lutir, sum eru fevndir av garantii
- x Lutir hjá fólki, sum ferðast ella gista hjá tær

## Eru avmarkingar í dekningum?

Her eru nøkur dømi um skaðar, sum innbústryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- ! Skaðar av svíðing ella smelting
- ! Stuldur, um húsini vóru ólæst
- ! Stuldur, um tú hevur verið grovliga óskettin
- ! Lutir, sum blíva burtur
- ! Manglandi viðlíkahald og slit

**Betri Trygging P/F** Kongabrúgvin, postsmoga 329, 110 Tórshavn
Tel +298 348 600, betri@trygging.fo, www.betri.fo

## Sjálvsábyrgd

Tú kanst áseta eina sjálvsábyrgd.

## Hvar eri eg dekkað/dekkaður?

Tryggingin dekkar lutir hjá húskinum, sum býr á adressuni, ið er nevnd í tryggingarskjalinum. Hon dekkar eisini lutir, sum tú ella onnur í húskinum hava við tykkum uttanfyri heimið. Hon er somuleiðis galdandi undir flyting, og um lutir fyribils verða tiknir við í eitt nú summarhús ella á ferð.

Undir Innbústryggingini kanst tú eisini tekna **Ársferðatrygging** og **Avlýsingartrygging**. Í so fall er Ársferðatryggingin altíð galdandi í teimum økjum, sum eru viðmerkt í tryggingarskjalinum. Ársferðatryggingin hevur tveir møguleikar at velja ímillum: Evropa og allur heimurin.

## Hvørjar skyldur havi eg?

**Tá ið skaði hendir**

- Tú skalt boða okkum frá skaðanum skjótast gjørligt Tað kann gerast á www.betri.fo, á tel 348 600 ella um "Mín Trygging"
- Royn við tað sama at avmarka skaðan
- Far ikki undir at burturbeina tað skadda ella at umvæla, fyrr enn avtala er gjørd við okkum
- Tjóvarí- og herverkskaðar skulu fráboðast løgregluni alt fyri eitt, tá tú varnast skaðan
- Ert tú uttanlands og fyri stuldri, óhappi ella øðrum, skalt tú ringja til SOS-International og boða frá. Í ávísum førum skalt tú eisini boða løgregluni á staðnum frá og fáa váttan frá teimum um, at málið er meldað

**Tá broytingar eru**

- Boða okkum frá, tá ið tú flytir bústað
- Boða okkum eisini frá broytingum í innbúnum, eitt nú tá ið tú keypir nýggj dýr ting, tit gerast fleiri í húskinum ella um nøgdin av innbúgvi veksur. So kunnu vit saman dagføra tryggingarupphæddina
- Hetta kann gerast á www.betri.fo, á tel 348 600 ella umvegis "Mín Trygging"

## Nær og hvar gjaldi eg?

Tú kanst gjalda árliga ella mánaðarliga.
Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu.

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, um ikki annað er avtalað í tryggingarskjalinum. Hon heldur sjálvvirkandi fram, um hon ikki verður uppsøgd.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tú kanst siga tryggingina upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

Somuleiðis kanst tú siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um tú gert tað innan 14 dagar eftir, at ein skaði er útgoldin ella avvístur.

**Betri Trygging P/F** Kongabrúgvin, postsmoga 329, 110 Tórshavn
Tel +298 348 600, betri@trygging.fo, www.betri.fo